gult cyan magenta svart



# GÍ fekk bank frá HB

*HB vann seg upp aftur á oddasessin, tá teir vundu burtur úr einum GÍ li›i, sum hinvegin var tamari enn teir leingi hava veri ›*

JÁKUP MØRK

HB-GÍ 5-0 (2-0)

Longu frá fyrsta bríksli var líkt til, at HB skuldi geva GÍ ein rættuligan umgang sunnudagin, og hóast GÍ onkuntí› fekk fylgt hampuliga væl vi›, so hev›oi tú alla tí›ina varhugan av, at henda dagin átti HB.

## Grei›ur munur á

Ta› var nevnliga beinanvegin sjónligt, at GÍ li›i› á vøllinum als ikki var sama GÍ li›, sum fólk eru von vi› at síggja. Hóast manningin var á lei› hin sama, so var hugbur›urin langt vi› sí›una av tí vanliga, og ta› var eisini skjótt, at spentar stø›ur spurdust burtur úr. Markeringarnar hjá gestunum vóru sum best bar til, og eftir at HB hev›i roynt at ligi › framvi› nakrar fer›ir í byrjanini, brast fyri nev eftir bert sjey minuttum.

Ein bóltur var› lyftur inn um GÍ verjuna, og Jón Rói Jacobsen slapp púra leysur av verjuni. Eftir at hava sn‡tt ein spurtandi gøtumann langa›i hann til móti málinum, men Hallur bjarga›i í fyrstu atløgu. Retururin fall tó aftur til Jón Róa, og uttan stórvegis hóvasták smekka›i hann bóltin flatt í neti›.

Løtuna eftir hetta hev›i HB fleiri møguleikar at økja um lei›sluna, men so vi› og vi› kom GÍ betri vi› í dystin. Fyrst og fremst var hetta tó orsaka› av, at fer›in hjá HB fór nógv ni›ur, kanska tí teir byrja›u at taka eitt sindur lætt upp á uppgávuna.

Gøtumenninir sluppu solei›is longur og longur ni›an á vøllin, og onkuntí› spurdust eisini spentar stø›ur burturúr. Heilt gali› mundi gingi› hjá HB, tá Magni fekk eina høga sending inn í brotsteigin, men Bár›ur var sum ein køttur undir tvørtrænum, tá mi›lingurin av Jarnskor brø›runum heilflukta›i.

Um ta› var hetta, sum fekk HB at vakna skal ikki sigast, men ta›, sum eftir var av dystinum mundi GÍ ikki hava naka›, sum líktist einum rættuligum málmøguleika. Heimamenninir tóku aftur meira yvir, og tá fyrri hálvleikur var so at siga li›ugt spældur, góvu teir GÍ mønustingin.



*Dysturin var› í roynd og veru avgjørdur, tá HB kom upp á 2-0, men gøtumenn vóru ógvuliga ónøgdir um, at málverjin ikki fekk fríspark, tá hann fór eftir bóltinum*

Mynd: Álvur Haraldsen

HB hev›i tá vunni› sær hornaspark í vinstru sí›u, og Allan var settur at skjóta. Gøtumenn vóru ógvuliga ónøgdir um, at málverjin ikki fekk tilluta› fríspark, men hvussu var og ikki, so enda›i bólturin í netinum umvegis Bartal Eliasen, sum sostatt var› skrásettur fyri sjálvmál.

## Einki at tosa um

Í seinna hálvleiki var ongantí› nakar sum helst ivi um, hvønn veg dysturin skuldi koppa. HB sat á so at siga øllum, og ta› eydna›ist teimum eisini at fáa tr‡ mál.

Ta› fyrsta kom, tá Allan Mørkøre var› sendir avsta› í høgru. Hann dróg frá einum verjuleikara, sn‡tti tann næsta og langa›i so bóltin í handara sí›unet.

Naka› seinni kundi Pætur Dahl økja til 4-0, eftir at eitt innlegg frá Allani slapp at fer›ast til handaru stong, og móti dystarenda kundi Bár›ur Mortansson seta seinasta seymin í, tá hann fekk fatur á einum bólti í GÍ brotsteiginum, og sí›ani seni hann flatt framvi› málverjanum.

Umframt málini hev›i HB fleiri a›rar gó›ar møguleikar, men klárt besti ma›ur á GÍ li›num, Hallur Hansen, vardi í fleiri førum sera væl fyri, tá HB leikarar vóru meira ella minni leysir vi› honum.

## Tí›in farin

Gøtumenn hava mangan havt ein meira sigandi leiklut í kappingini, enn teir hava í løtuni, men sannleikin er helst tann, at teir í løtuni ikki eru nóg sterkir at standa seg í oddinum.

Sunnudagin s‡ndu teir heldur ikki tann strí›svilja, sum á›ur hevur bori› teir so langt, og ta› er helst í hesum, at største orsøkin til ósigurin skal finnast.

Allir 50/50 bóltar enda›u vi›, at HB leikarar struku avsta› vi› bóltinum, og harumframt var einki sum helst nærlagni í verjuspælinum hjá GÍ.

Tá hetta er sagt, skal eisini nevnast, at HB í løtum s‡ndi sera gott fótbóltsspæl, og hóast alt skal eitt sindur til, fyri at vinna somiki› trygt á GÍ.

Serliga fyrstu løtuna var rættulig fer› á HB samanspælinum, og ta› var ein fragd at síggja, hvussu væl teir brutu ígjøgnum í bá›um bor›unum. Í vinstru vi› gó›um samanspæli millum Andrew, Róa og Janus, og í høgru vi› rinari rástyrki frá einum Allani Mørkøre, sum rættuliga tykist á veg upp aftur, eftir ska›an hann hevur drigist vi› í knænum.

## Fremsta FM bo›

Sum HB spældi sunnudagin tykjast teir at vera mest upplagda FM bo›i› í løtuni. Eisini um hugsa ver›ur um komandi toppdystin á Svangaskar›i.

Sunnudagin s‡ndu teir í øllum førum ikki á nakran hátt, at teir eru bangnir fyri at vinna gullmerkini, og júst hetta er ein sera t‡dningarmikil eginleiki, tá endaspurturin skal setast í gongd.

Bæ›i VB og B68 hava s‡nt stórar veikleika á sálarliga stø›inum, tá tey hava havt oddasessin í varveitslu, og júst sálarligi parturin av spælinum ver›ur uttan iva sera t‡dningarmikil, tá gullmerkini skulu gevast.

Harumframt tykist HB at hava eina størri breidd í hópinum enn hinir bá›ir oddafiskarnir, og móti GÍ tóktist ta› ongantí› at gera nakran mun skeivan vegin, tá útskiftingar vór›u framdar. Tvørtur ímóti var líkt til, at innskiftu leikararnir vildu prógva, at teir eiga at byrja inni næstu fer›, og eitt nú komu bæ›i Pætur og Bár›ur á máltalvuna eftir innskiftingina.

Samanumtiki› ein hugagó›ur dagur hjá HB vi›haldsfólkum, sum so smátt munnu vera farin at hugsa um eina útfer› til Sumbiar í seinasta umfarinum.

Á›renn ta› kemur so langt, skal Svangaskar› tó fyrst fáast frá hondini, og einki er at ivast í, at fer›slan inn í Eysturoynna fer at ver›a stór komandi sunnudag.

HB-GÍ 5-0 (2-0)
1-0: Jón Rói Jacobsen 6
2-0: sjálvmál 44
3-0: Allan Mørkøre 67
4-0: Pætur Dahl 82
5-0: Bár›ur Mortansson 89

Dómari: Jens Petur Brattalí› (VB)

HB:
Bár›ur Johannesen – Jóhannis Joensen, Hans á Lag, Símun Eliasen, Janus Joensen – Allan Mørkøre, Rúni Nolsøe, Hallur Danielsen, Rói Árting – Jón Rói Jacobsen, Andrew av Fløtum

GÍ:
Hallur Hansen – Pól Ennigar›, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Áslakur Petersen, Magni Jarnskor, Pauli Jarnskor, Súni Olsen, Henning Jarnskor – Hans Pauli Petersen, Óli Hansen




gult cyan magenta svart





*Súni Fríði og B68 máttu eins og hini bæði oddaliðini ásanna, at NSÍ er sera væl fyri í løtuni. Bæði VB og HB mistu oddasessin eftir tap móti NSÍ og soleiðis var eisini hesu ferð*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# NSÍ feldi aftur eitt oddalið

*Býtið av málmøguleikum var hips um haps, men NSÍ hevði stóra úrtøku, meðan toppskjúttarnir hjá B68 vóru sørir*

**NSÍ-B68 3-0 (2-0)**

Toftamenn vórðu sunnukvøldið sendir út um aftur Rókina tómhentir. Fyri triðju ferð eftir summarfrítíðina eydnaðist tað NSÍ at fáa øll stigini ímótti einum oddaliði. Tað var væl klára, tá tikið verður við, at Christian Høgni Jacobsen og Sonni L. Petersen vóru leikbannaðir, at ein tann frægasti bóltspælarin, Sjúrður Jacobsen, var skaddur, og at visitturin hjá Abrahami Løkin á besta liðnum sigst vera liðugur.

NSÍ hevði fýra upplagdar málmøguleikar, og teir fingu trý mál. B68 mundi hava umleið sama talið av málmøguleikum, men teir fingu einki mál. At tað ikki var teirra dagur varð so dyggiliga undirstrika, tá teir í 67. minutti fingu brotsspark. Eftir uppspæl í vinstru og innlegg frá Jákupi Djurhuus, varð Marlon Jorge feldur av Jónsteini Petersen, men Súni Fríði Johannesen sendi í stólpan til vinstru fyri seg sjálvan.

Tá var støðan 3–0, dysturin var avgjørdur, og NSÍ hevði verið tætt við at økja til 4–0. Av egnari hálvu sendu teir fríspark fram í vinstru, hagani Jónstein Petersen úr sekstan metrum smekkaði flatt í nærra stólpan.

Henda møguleikan fingu teir stutt eftir, at teir tíðliga í 2. hálvleiki høvdu punkterað dystin. Tað gjørdi Eddie Mikkelsen úr vinstru, eftir at uppspæl í høgru hjá Gert Langgaard var endað við tveimum fløtum sendingum tvørtur um vøllin.

## Mál og møguleikar hjá NSÍ

NSÍ setti hol á eftir eitt korter. Teir vunnu fyrsta horna í dystinum í vinstru, tað endaði við nýggjum horna, sum Ian Højgaard sendi beinleiðis í handara stólpan. Bólturin stakk út í vøllin, og meðan nógvir toftamenn hugdu at, tveitti Djóni N. Joensen seg fram og stútaði upp í nettakið.

1–0 gjørdist til 2–0, tá NSÍ í 26. minutti aftur var í nánd av B68 málinum. Jónstein Petersen sendi miðskeiðis av B68 hálvuni í høgru frísparksinnlegg innfyri málið. Bólturin sigldi yvir vinum og fíggindum og til handara stólpan, har Dánial Hansen var blankur og stútaði í kassan.

## Møguleikar hjá B68

Toftamenn mundu kenna tað soleiðis, at hetta var ikki teirra dagur. Teir høvdu verið um reppið at fáa um endan aftur, tá støðan var 1–0, men teir megnaðu ongantíð at fáa úrtøku burturúr møguleikunum.

Fyrsta møguleikan fekk Fróði Benjaminsen, tá eitt korter var farið. Hann sneiddi í høgru fleiri av, men tá hann var komin í brotsteigin og skuldi leggja bóltin til vinstra bein, varð hann takladur.

Í næsta álopinum, eftir at NSÍ hevði sett hol á, endaði B68 uppspæl í høgru við, at Fróði Benjaminsen stakk Marcello leysan í vinstru. Í brotsteiginum sneiddi hann út frá, men úr góðari støðu fór skotið við síðuna av handara stólpanum aftanfyri Rúna Joensen.

Sjey minuttir undan steðginum spældi Fróði Benjaminsen Súna Fríða Johannesen leysan í brotsteiginum. Royndin hjá honum tók stólparótina.

## Uppskriftin

Tað var størri tyngd í spælinum hjá NSÍ, enn tað var í hjá B68. Teir á heimaliðnum vunnu flestu nærdystirnar, og í høvuðspælinum vóru teir suverenir. Teir spældu við trimum í miðverjuni, og hesir vóru botnurin í avrikinum.

Umframt at gera fyrsta málið, so var Djóni N. Joensen eyðsýndur sum góður stýrimaður í verjuni. Hann og Arnfinn Langgaard vunnu allar luftbóltarnar ímóti lítið sjónligu Marcello Marcellino og Súna Fríða Johannesen, og Kári Hansen stóð seg eisini væl sum eftiransari.

Á miðvøllinum var Elian Hansen við fyri fyrstu ferð í langa tíð. Hann hevði eina uppgávu. Hon var at fylgja Øssuri Hansen alla staðni. Øssur var saman við Jan Dam og Arnbirni Danielsen mest eyðsýndi B68 maðurin, men tætta eftiransingin gjørdi, at hann ongantíð megnaði tað yvirskotið, sum í fleiri øðrum dystum í ár hevur gjørt, at B68 hevur fingið mál og vunnið sigrar.

Brynjolvur Nielsen, Ian Højgaard, Eddie Mikkelsen og Gert Langgaard fingu tyngd og breidd í NSÍ spælið, og í álopinum arbeiddu Jónstein Petersen og Dánial Hansen nógv.

NSÍ, NSÍ fagnaðu heimaáskoðararnir, sum hava frøtt seg um fleiri sigrar á teimum fremstu, men sum samstundis mugu staðfesta, at tað neyvan verður meiri enn næstan heiðursmerkir í ár. Toftamenn fóru nakkalangir út um Løkin, men teir kunnu framvegis avgera, um teir skulu vinna gull ella ikki.

**jh**

**NSÍ-B68 3-0 (2-0)**
1-0: Djóni N. Joensen 15
2-0: Dánial Hansen 26
3-0: Eddie Mikkelsen 52

**Dómari:** Lassin Isaksen (KÍ)

**NSÍ:**
Rúni Joensen – Kári Hansen, Djóni N. Joensen, Arnfinn Langgaard – Gert Langgaard, Elian Hansen, Brynjolvur Nielsen, Ian Højgaard, Eddie Mikkelsen – Dánial Hansen, Jónstein Petersen

**B68:**
Magnus Poulsen – Jan C. Dam, Arnbjørn Danielsen, Oleif Joensen – Marlon Jorge, Jan Petersen, Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen, Jákup Djurhuus – Súni Fríði Johannesen, Marcello Marcellino

